## Turkar og armenar nærkast

Í mong ár hevur markið millum Turkaland og Armenia verið stongt orsakað av áralongum stríði, men nú eru londini farin at nærkast hvør øðrum. Í gjár hittust uttanríkisráðharrarnir hjá londunum, og teir samdust um at virka fyri at knýta diplomatiskt samband vlandanna millum. Í frágreiðingini frá fundinum stóð, at partarnir skulu taka støðu innan seks vikur, og at málið við tí diplomatiska sambandinum er at tryggja frið og støðug viðurskifti í økinum. Amerikanska stjórnin hevur tikið undir við semingsroyndunum.




Swan:

# Søguligur hetlendskur silda

**Í seinastu viku var forvitnislig vitjan úr Hetlandi. Hetta var ein av teimum gomlu hetlendsku sildabátunum, sum er ein partur av fiskivinnusøguni hjá Hetlandi og eisini hjá Føroyum**

VITJAN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Tað hevur verið greitt frá her í blaðnum, at flaggið á Swan var stjolið. Hetta var ein stór skomm, og ikki kom flaggið aftur heldur. Men teir funnu so eitt gamalt flagg, sum fekk frið.

Swan er ein gamal sildabátur, sum er varðveittur, eins og vit hava varðveitt minnilig skip.

Hetland hevur eina sjóvinnu- og fiskivinnusøgu, sum gongur nógv longur aftur í tíðini enn okkara.

FF-blaðið hevði í 2006 eina samrøðu við ta tá meira enn 90 ára gomlu Margaret Thomson, sum greiddi frá tí, hon visti og mintist um sjóvinnu hjá hetlendingum. Abbi hennara plagdi at vera á hvalaveiðu undir Grønlandi, og júst søgan um hetlendska luttøku í hesi veiðu er eisini áhugaverd.

Tað var nevniliga ein stórhending í Lerwick, táið hvalabátarnir á hvørjum ári løgdu inn í Lerwick á veg til Grønlands. Skipini ankraðu upp inni á redini 10-12 dagar frá endanum á februar mánaði til byrjanina av mars mánaði. Endamálið var at útvega sær ta manning, sum restaði í at vera fullmannaðir. Skipararnir vildu hava manning úr Hetlandi, tí hildið varð, at hetlendingar bæði høvdu skil á hvalaveiðu og á sigling. Skipini komu úr ymiskum havnum í Skotlandi, serliga úr Peterhead og Dundee. Hvørt av skipunum hevði 20-30 hetlendingar við.

Tað sigur nakað um, hvussu stór henda vinnan er, at 9. mars 1859 løgu 50 hvalaveiðuskip inni í Lerwick á veg til Grønlands at fáa manning.

### Hollendskir fiskimenn og hollendskar tuflur

Fyrst Margaret minnist var eitt satt sildarrok í Lerwick og her luttók ein hópur av skipum ymsa staðni frá. Hon minnist serliga hollendingar, sum eisini komu higar. Teir vóru so nógvir, at sunnudagar plagdu serligar gudstænastur at verða hildnir á hollendskum í kirkjum í býnum. Fólk hava tikið til allar eyðkendu hollendsku tuflurnar, sum stóðu í forkirkjuni.

Tað kundu liggja so nógv skip inni, at tað kendist, sum tey rukku heilt yvir á Bressay, sum er oyggin beint yvir av Lerwick.

Margaret minnist eitt skjaldur, sum børnini plagdu at syngja: Dutchmen, dutchmen don't take me. Take (tey nevndu navnið á onkrum barni t.d. Jim Johnson) and put him in the sea.“ Annars minnast tey einki ringt um hesar hollendsku fiskimenn.

### Sildafiskiskapurin í Hetlandi

Áðrenn føroyingar yvirhøvur byrjaðu at fiska við sluppum veiddu eitt stórt tal av sluppum úr Hetlandi undir Føroyum og veiðan var virkað til klippfisk heima í Hetlandi. Hetlendingar fóru sum frá leið frá sluppveiðuni millum annað undir Føroyum til sildafiskiskap. Tað sama gjørdu fiskimenn i Skotlandi. Roynt varð við gørnum, og sildin varð so landað til virkingar á landi, har hon varð saltað í tunnur. Eitt av skipunum, sum varð bygt til sildaveiði, varð júst Swan, sum var bygd til endamálið í 1900 í Lerwick. Hann var bygdur úr eik og var 67 føtur til longdar. Hann er størsta far sum er bygt í Lerwick. Veitt varð við línu um várið og við sildagørnum frá mei til september. Skipið varð rættuliga skjótt selt til Whalsey, sum er ”høvuðsstaður” fyri hetlendska nótaflotan. Her



*Nakrir av manningini. Nr. 2 og 3 frá vinstru eru Calum Neilson og John Goodlad. Undir liðuni á John stendur skiparin Magnus Sinclair*